


Navn, bústaður og telefonnummar hjá koyrilærara (stempul)

# STÓRT VIÐFESTISAKFAR TIL LASTBIL

## LESIÆTLAN Í KOYRIÚTBÚGVINGINI TIL BÓLK CE

| | |
|---|---|
| Navn á næmingi | |
| Føðingardagur | |
| Bústaður | |
| Telefonnummar | |
| Frálæran byrjað hin | Frálæran endað hin |

## Lesiætlan til bólk CE
## (stórt viðfestisakfar til lastbil)

Koyrifrálæran (t.e. ástøðisfrálæra og verklig koyrifrálæra) skal **í minsta lagi** fevna um:

13 skúlatímar í ástøðishøli og 16 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru (venjingarakstur), og frálæran skal í minsta lagi fara fram í 14 frálærudagar.

Henda lesiætlan fevnir um tað, sum svarar til 29 skúlatímar, sum hvør varir í minsta lagi 45 minuttir, herundir 3 eftirmetandi royndir. Ætlar ein at fremja fleiri enn tær 3 eftirmetandi royndirnar í ástøði, skulu hesar leggjast uttan fyri ásettu tíðina upp á 29 skúlatímar á 45 minuttir. Samlaða frálærutíðin er eitt avgjørt minstamark fyri at kunna fremja eina fullgóða frálæru.

Tað eru fyrst og fremst viðurskifti og evni einstaka koyrinæmingsins, ið eru avgerandi fyri, hvussu nógvar skúlatímar – **út yvir teir í minsta lagi ásettu skúlatímarnar** – ið koyrinæmingurin skal hava, áðrenn verkliga royndin kann verða framd.

Teir kravdu skúlatímarnir eru skipaðir soleiðis:

- 13 skúlatímar í ástøði (teori) við 3 eftirmetandi royndum
- 16 skúlatímar í venjing á vegi

Tey frálæruevni, sum ávíst eru í lesiætlanini, vísa til lutmálini og/ella høvuðsmálini við nummaráseting í frálæruætlanini.

Ein og sama frálærudag má í mesta lagi verða undirvíst í 4 skúlatímar í ástøðishøli og í 2 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru. Við koyring á hóskandi venjingarøki, landavegi og koyring í myrkri, er tó loyvt at nýta 4 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru sama dag, við í mesta lagi 5 lutmálum í venjing á vegi í 7. parti í frálæruætlanini.

Lesiætlanin verður gjørd í tveimum eins eintøkum. Annað eintakið verður latið næminginum. Eintak koyrilærarans skal **altíð** verða havt við til frálæru í ástøði (teori) og koyring, eins og til ástøðisroynd og verkliga koyriroynd.

Beint eftir hvønn einstakan skúlatíma skulu koyrilærari og koyrinæmingur á eintak koyrilærarans vátta við undirskrift síni (í minsta lagi eitt fornavn og eftirnavn), at undirvíst hevur verið í evninum fyri viðkomandi undirvísingartíma, herundir dagfesting fyri framda undirvísing og veruliga nýtta tíð.

## MINST TIL:

Til verkligu koyriroyndina skal umsøkjarin hava við sær eitt alment samleikaprógv við mynd (t.d. galdandi pass ella áður útgivið koyrikort).

**Vart verður gjørt við, at sambært revsilógini § 163 er tað revsivert at veita ósanna váttan til nýtslu hjá almennum myndugleika, og at revsingin fyri hetta er bót ella fongsul í upp til 4 mánaðir..**

# FRÁLÆRANDI KOYRILÆRARAR:

**Navn, bústaður og tlf.nr. hjá koyrilærara** **Undirskrift koyrilærarans**

| | |
|---|---|
| Stempul: | Undirskrift: |
| Stempul: | Undirskrift: |
| Stempul: | Undirskrift: |
| Stempul: | Undirskrift: |
| Stempul: | Undirskrift: |

## Avleiðing av steðgi í koyrifrálærutíðarskeiðnum:

- Steðgur í meira enn 3 mánaðir áðrenn 7. part (venjing á vegi) = Byrja av nýggjum
- Steðgur í meira enn 4 mánaðir, áðrenn ástøðisroynd er staðin = Byrja av nýggjum
- Steðgur í 3 – 4 mánaðir í 7. parti (venjing á vegi) = Byrja av nýggjum í 7. parti
- Steðgur í 3 – 5 mánaðir, eftir at ástøðisroynd er staðin = Gjøgnumføra 4 skúlatímar í 7. parti
- Steðgur í 5 mánaðir ella meira = Byrja av nýggjum og nýggj ástøðisroynd

# FRÁLÆRUMÓTUL 1

**Skúlatími 1 (1 x 45 minuttir) í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

Innihald og endamál við koyriútbúgvingini. Hvussu frálæran verður gjøgnumførd í koyriskúlanum.

Útflýggjan av lesiætlan og øðrum næmingatilfari. Gjøllig kunning um útbúgvingargongdina, undir hesum hvussu ástøðiliga og verkliga útbúgvingin hanga saman, steðgur í koyriútbúgvingini og gjøgnumgongd av lesiætlan.

10.1 Treytir fyri at fáa koyrikort
10.2 Fremjan av koyriroynd

Tey viðurskifti, ið eru neyðug fyri at lýsa krøvini til koyriútbúgvingina, eins og treytir fyri at sleppa til koyriroynd, undir hesum treytir um heilsukrøv og aldur.

Fyrireiking næmingsins til einstøku skúlatímarnar.

Klára eina eftirmetandi ástøðisroynd til bólk B (ella C).

1.1 Stýrigreiður
1.2 Bremsur

# FRÁLÆRUMÓTUL 2

**Skúlatími 2 og 3 (2 x 45 minuttir) á hóskandi venjingarøki, ídnaðarøki ella líknandi**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

Gjøgnumgongd av akfarinum, undir hesum tilgerð og útgerð.

1.9 Samankopling
2.1 Fyrireiking til koyring
2.2 Spegl á vognraðnum
2.3 At fara frá og steðga við vegjaðara
2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

# FRÁLÆRUMÓTUL 3
**Skúlatími 4 og 5 (2 x 45 minuttir) í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
| --- | --- |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.3 El-skipan, lyktir, endurskin, horn o.a.
7.1 At fara frá og steðga við vegjaðara
7.3 Ferð á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.4 Farbreytaskifti og samanflætting
7.13 Høgrasving á krossvegi
7.14 Vinstrasving á krossvegi
7.15 Koyring í rundkoyring

Endurtøka av:

1.1 Stýrigreiður
1.2 Bremsur

Endurtøka frá bólki B:

3. Eginleikar at handfara akfør
4. Atferð hjá øðrum ferðandi
5. Vegumstøður

# FRÁLÆRUMÓTUL 4
**Skúlatími 6 (1 x 45 minuttir) á hóskandi venjingarøki, ídnaðarøki ella líknandi**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
| --- | --- |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1-3 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)
2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

# FRÁLÆRUMÓTUL 5
**Skúlatími 7 og 8 (2 x 45 minuttir) í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
| --- | --- |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.4 Berandi lutir
1.5 Motorur og transmissión, orku- og umhvørvisrøtt koyring
1.6 Skrokkur, bygnaður o.a.
1.7 Tilgerð innan, útsýni og serlig útgerð
1.8 Eftirlitstól (ferðskrivari)
1.9 Samankopling av vognraðnum og skjøl
1.10 Serlig akfør

# FRÁLÆRUMÓTUL 6

**Skúlatími 9 og 10 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| | |
|---|---|
| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: ╳ |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

**1. venjing.** Venjingin fevnir um:

7.1 At fara frá og steðga við vegjaðara
7.2 Pláss á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.3 Ferð á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.4 Farbreytaskifti og samanflætting
7.11 Koyring fram at krossvegi (endurtøka frá bólki B)
7.13 Høgrasving á krossvegi
7.14 Vinstrasving á krossvegi

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

# FRÁLÆRUMÓTUL 7

**Skúlatími 11 og 12 (2 x 45 minuttir)**
**í ástøðishøli**

| | |
|---|---|
| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: ╳ |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

7.6 Koyring fram við steðgaðum akførum, fólki til gongu o.ø.
7.7 Møti
7.8 Koyring framman fyri ella aftan fyri onnur
7.9 Yvirháling
7.11 Koyring fram at krossvegi
7.17 Koyring við síðuna av øðrum

# FRÁLÆRUMÓTUL 8

**Skúlatími 13 og 14 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: ✕ |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

**2. venjing:**

7.6 Koyring fram við steðgaðum akførum, fólki til gongu o.ø.
7.7 Møti
7.8 Koyring framman fyri ella aftan fyri onnur
7.11 Koyring fram at krossvegi
7.12 Koyring beint fram á krossvegi
7.13 Høgrasving á krossvegi
7.14 Vinstrasving á krossvegi
7.15 Koyring í rundkoyring

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)
7.2 Pláss á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.3 Ferð á vegnum meðan koyrt verður beint fram

# FRÁLÆRUMÓTUL 9

**Skúlatími 15 og 16 (2 x 45 minuttir)**
**í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: ✕ |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

Grundreglur fyri koyring við vognraði.

6.1 Ávísingar um ferðslu
6.2 Breidd, longd, hædd og vekt á vognraðum
6.3 Koyri- og hvíluásetingar, nýtsla av eftirlitstóli
7.16 Koyring á motorvegi

Eftirmetandi roynd í ástøði.
Gjøgnumgongd av eftirmetandi roynd.

# FRÁLÆRUMÓTUL 10

**Skúlatími 17 og 18 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki – landavegur**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
|---|---|
| | × |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

**3. venjing.** Venjingin fevnir um:

7.2 Pláss á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.3 Ferð á vegnum meðan koyrt verður beint fram
7.6 Koyring fram við steðgaðum akførum, fólki til gongu o.ø.
7.7 Møti
7.8 Koyring framman fyri ella aftan fyri onnur
7.9 Yvirháling
7.16 Koyring á landavegi samanhangandi

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

# FRÁLÆRUMÓTUL 11

**Skúlatími 19 og 20 (2 x 45 minuttir)**
**í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
|---|---|
| | × |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

7.18 Steðgur og parkering
7.20 Koyring í tunli
10.1 Treytir fyri at fáa koyrikort
10.2 Fremjan av koyriroyndini
10.3 Lógarásetingar um koyrikort

Eftirmetandi roynd í ástøði.
Gjøgnumgongd av eftirmetandi roynd.
Koyring í tunli kann í staðin í ástøðisfrálæruni verða framd í frálærumótuli 9.

# FRÁLÆRUMÓTUL 12

**Skúlatími 21 og 22 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
| --- | --- |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

**4. venjing:**

7.12 Koyring beint fram á krossvegi
7.13 Høgrasving á krossvegi
7.14 Vinstrasving á krossvegi
7.15 Koyring í rundkoyring
7.17 Koyring við síðuna av øðrum

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

# FRÁLÆRUMÓTUL 13

**Skúlatími 23 og 24 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
| --- | --- |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

**5. venjing:**

7.18 Steðgur og parkering
7.20 Koyring í tunli

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (grundleggjandi venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (grundleggjandi venjing)

Endurtøka av áður framdum venjingum, alt eftir tørvi einstaka næmingsins.

Koyring í tunli kann í staðin verða framd í verkligu koyrifrálæruni í frálærumótuli 10 ella 12.

# FRÁLÆRUMÓTUL 14

**Skúlatími 25 og 26 (2 x 45 minuttir)**
**í ástøðishøli**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: × |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

Koyriteknisk viðurskifti.

9.1.1 Týdningurin av vegtaki
9.1.2 Lasting, dekktrýst o.a.
9.2.1 Rørsluorka (bevægelsesenergi) og ferð
9.2.2 Miðflóttamáttur (centrifugalkraft)
9.2.3 Bremsulongdir
9.2.4 Nýtsla av vegtaki
9.3.1 Slalom
9.3.2 Dupult undanskáking uttan at bremsa
9.3.3 Samansett bremsu- og undanskáking
9.4.1 Koyring í vegbugi
9.4.2 Bakhjólsglíðing við lastbilinum
9.4.3 Framhjólsglíðing við lastbilinum
9.4.3 Glíðing við viðfestiakfarinum

**Fremjan av ástøðisroynd.**

Øll frammanfyristandandi lutmál skulu vera gjøgnumførd við nøktandi úrsliti, áðrenn ástøðisroyndin kann verða framd.

# FRÁLÆRUMÓTUL 15

**Skúlatími 27 (1 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: × |
|---|---|
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

1.1–1.9 Stakroyndareftirlit v.m. av útgerð á viðfestisakfarinum (møguliga lastbilinum)

Endurtøka av:

2.4 Høgrasving um horn, koyring aftureftir (víðkað venjing)
2.5 Koyring aftureftir við bremsing móti máli (víðkað venjing)

Endurtøka og fyrireiking til verkliga roynd.
Endurtøka av áður framdum venjingum, alt eftir tørvi einstaka næmingsins.
Eftirmetandi verklig koyriroynd.

# FRÁLÆRUMÓTUL 16

**Skúlatími 28 og 29 (2 x 45 minuttir)**
**á venjingarstrekki**

| Dagfesting fyri frálæru: | Verulig nýtt tíð í min: |
|---|---|
| | X |
| Undirskrift koyrilærarans: | |
| Undirskrift næmingsins: | |

Endalig koyrifrálæra skal fara fram sum býkoyring í Tórshavn undir fløktum og truplum ferðsluumstøðum, har næmingurin fær venjing í og eina kenslu av, hvussu tað verður at koyra eitt akfar sjálvstøðugt undir slíkum umstøðum.

**Verklig koyriroynd.**

## Eftirmetingar

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |
| Dagur: | Frálærumótul: | Minuttir: | Undirskrift næmingsins: | Undirskrift koyrilærarans: |

SENDISTOVAN

Útgáva 5.09 (08/12)

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo